# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Færøernes Mellem- og Realskole:

## Fimleikaflokkur umleið 1925




Í sambandi við eina framsýning sum verður á ólavsøku í ár í gamla realskúlanum í Havn, søknast vit eftir nøkrum nøvnum, ið mangla til hesa myndina.

Myndin er av einum fimleikaflokki í millumskúlanum, hon er tikin umleið 1925 í fimleikarhøllini, sum varð tikin niður í 1956, í sambandi við at stóri kommunuskúlabygningurin varð bygdur.

Vit kenna bert nakrar av næmingunum, teir eru: nr. 1 Oliver Dam (Livve), nr. 3 Hans Vang (seinni Hanus við Høgadalsá), nr. 5 Johs Petersen (sonur Wenzel Petersen), nr. 8 dóttir A.C.Evensen (Brynhild?), nr. 10 Jens Pauli av Reyni, nr.14 D. P. Danielsen (sakførarin), nr. 18 Mia Trónd Hansen, nr. 20 Birthe Helena (Birthelena) f. Egholm (kona Niels L. Arge ursmið), nr. 21 Jona (Birran) f. Djurhuus, kona Zacharias Niclasen á Skipafelagnum.

Vit søknast eftir nøvnunum á nr. 2, 4, 6, 9, 11, 12, 13, 15, 16, 17, 19, 22, 23, og 24.

Tey, sum kennast við hesar næmingar, vera vinarliga biðin um at seta seg í samband við Jórunn Dánialsdóttir, tel. 316024 ella 226024.

Annars leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum av lærarum og næmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966. Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at siga sær frá. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

### Eftirlýsing

Ì sambandi við at Jórunn Dánialsdóttir savnar myndir av lærarum og næmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966, sóknast hon eftir myndasøvnum hjá lærarunum Richardi Long og Jógvani við Ánna. Hesi myndasøvn eru lánt út, og eingin veit hvør hevur tey. Í hesum søvnum eru myndir av næmingunum, sum teir vóru lærarar hjá.

Lesið
Sosialin
-tað
loysir
seg

Orðafelli:

## Tómar tunnur buldra mest

**Tómar tunnur buldra mest (á føroyskum:** reyparin hevur tíðum lítið innanfyri).

Orðingin finst fyrstu ferð hjá Shakespeare, sum í leikinum "Henry 4." sigur: "The empty vessel makes the greatest sound", men frammanundan verður sagt: The saying is true, - taluhátturin er sannur.

Longu á døgum Shakespeares hevur orðafellið verið vælkent. John Lyly (1553-1606) hevur setningin í 1579 í "Euphues, the Anatomy of Wit".



*(Kelda: Bevingende ord eftir T. Vogel-Jørgensen)*